# Banka kjøt

Stutt vegleiðing um, hvussu spælt verður.

**Eitt stuttligt spæl, sum bert krevur umleið 6 ella fleiri luttakarar og pláss at spæla á.**

**Øll ið eru við, leiðast og stilla seg í ein ring, uttan ein, sum er tann sum bankar.**

Tann sum skal banka, er uttan fyri ringin og rennur við sólini uttanfyri ringin. Meðan hann rennur, slær hann ein av hinum á herðarnar ella ryggin. Hesin skundar sær at fara út úr ringinum og rennur, tað dýrast hann er mentur, mótsattan veg (sólarrangt), fyri at kappast við hin um at sleppa upp í aftur ringin. Tann sum fyrst kemur runt, finnur plássið og kemur upp í aftur ringin, verður verðandi í ringinum, meðan tann sum varð og seinur, skal verða tann sum bankar.

Áðrenn spælið byrjar, verður avgjørt, um plássið, sum tann bankaði er fari úr, skal verða verandi opið, til tey sum renna eru komin runt ringin, ella tað skal verða latið aftur. Um tit avgera at lata tað aftur, verður tað truplari hjá teimum sum renna, at finna rætta plássið aftur.



GIGNI
Heilsufrøði til børn & ung

Niels Finsensgøta 37 · Postboks 132 · 110 Tórshavn · Tlf:562 300 · www.gigni.fo